## Nýtt fornfund á Svalbard



Granskarar hava funnið leivdirnar av eini risastórari reptil á Svalbard. Sagt verður, at beinagrindin er tríggjar metrar stór og 10 metrar long, og hevur djórið soleiðis verið á støðd við ein vanligan býarbuss. Jørn H. Hurum, ið er ein av granskarunum á staðnum sigur við Bergens Tidende, at teir eru rættiliga vísir í, at talan er um ein sannan risa, sum ongan tíð áður hevur verið sæddur. Í august mánaði funnu granskarar eisini leivdina av einum øðrum stórum fornaldardjóri á Svalbard.

## Jólatræið í Kirkjubø

Jólatræið í Krikjubø verður tendrað fríggjakvøldið 7. desember kl. 19.00 á Vaglinum. Jóhan Hendrik Winther Pouls, professari, og Sverri Steinhólm, prestur, tala, og kórið Sólarmagn syngja við træið. Jólamaðurin verður eisini at síggja í Kirkjubø, tá træið er tendrað.

# framtíðina



miðdepli, sum leingi hevur verið bíðað eftir, og sum Klaksvíkar kommuna hevur planerað hetta økið til.

Men skal tað henda, noyðist kommunan helst at lata Niels Motensen hava sína ávirkan á, hvussu konseptið skal skrúvast saman, tí hetta eftir øllum at døma – og í verandi líki - tykist honum ov kompliserað og stórsligið.

Tíðin gongur, og lítil ivi er um, at Niels Mortensen arbeiðir við síni verkætlan. Tað ger Óli Marner Christiansen ivaleyst eisini - enn.

Kanska, kanska ikki.

Tað svarið kemur ikki greitt fram í hinari greinini.

Spurningurin er so, hvørt vinnur fyrst á mál – um báðir partar vinna á mál, ella um annar parturin noyðist at leggja ”kongin”, tí hin vann slagið um marknaðin í Klaksvík og Norðoyggjum í síni heild.

### Niels yvirtekur?

Eingin veit við vissu, hví Niels Mortensen og Óli Marner Christiansen ikki tosa saman í løtuni. Tað kann vera, tí Niels hevur tikið sína avgerð um Borðoyarvík – ella tí, at hann vil leggja trýst á Óla Marner og Klaksvíkar kommunu, soleiðis at hann at enda stendur eftir við planeraða økinum – og miðbýnum - í Klaksvík.

# Óli Marner liggur ongum í vegin at byggja í Klaksvík

**- Tað er at gleðast yvir, at okkurt hendir við handilslívinum her norðuri. Eg fegnist um, at FK fer at byggja, og eg fegnist eisini um, at Niels Mortensen er farin at gera tekningar yvir sínar bygningar á Borðoyarvík, sigur Óli Marner Christiansen sum ásannar, at lítið hendir við ætlaðu handilsmiðstøðini í løtuni**

HANDILSLÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Óli Marner Christiansen, sum er maðurin, ið hevur brúkt nógva tíð, pening og orku upp á verkætlanina at byggja eina handilsmiðstøð á ”sandinum” í Klaksvík, kunnaði herfyri býráðið um støðuna.

- Í løtuni hendir einki, og í løtuni er eingin framdrift í málinum um handilsmiðstøðina.

Tað ásannar Óli Marner Christiansen í samrøðu við Sosialin í morgun.

Spurdur, um hann hevur slept ætlanini at byggja miðstøðina, er svarið hvørki ja ella nei.

- Eg eri keddur av tí, men tað er einki nýtt í málinum. Hvat annars fer at henda, verður neyðugt at taka støðu til, tá ið tann tíðin kemur.

### Liggir ongum í vegin

Óli Marner sigur, at hann hevur latið býráðið vita, at hann ikki vil liggja í vegin fyri nøkrum, sum kundi hugsað sær at bygt á planeraða økinum innast í Klaksvíkini.

– Tað verður ein spurningur millum tann, sum hevur okkurt hugskot og býráðið, sigur hann.

Óli Marner sigur seg eisini hava skilt, at Niels Mortensen hevur latið gera tekningar við handilsvirksemi yvir sínar bygningar á Borðoyarvík, og herfyri gjørdist greitt, at FK helst fer at byggja nýggjan handil norðanfyri Statoil-støðina í Klaksvík.

Eru tað hesar byggingar, sum máa grundarlagið undan ætlaðu handilsmiðstøðini – ella, hvørjum verður bíðað eftir í løtuni?

– Eg dugi ikki ordiliga at siga, hvørjum bíðað verður eftir, men vit vilja í fyrsta lagi vita, hvat hendir, og eg havi sum nevnt kunnað býráðið um støðuna, sum er beint í løtuni.

### Kapping og framdrift

Óli Marner sigur seg fegnast um, at okkurt hendir við handilslívinum í Klaksvík, og at hann virkuliga meinar tað, hann sigur, letur hann okkum skilja.

– Tað er í fínasta lagi, at handilslívið her norðuri mennist, tí her má og skal okkurt henda. Tað gongur seint, men handilslívið fer at mennast, sum tíðin gongur. Eg fegnist um, at FK fer at byggja, og eg fegnist eisini um, at Niels Mortensen er farin at gera tekningar yvir sínar bygningar á Borðoyarvík.

Í hesum viðfangi ásannar, Óli Marner, at lítil – ella eingin - framdrift er við ætlaðu handilsmiðstøðini í løtuni, og hann veit ikki at siga, hvat fer at henda við hesi verkætlan.

### Býarmyndin burtur

– Málið hjá mær hevur verið at hildið meg innan teir karmar, sum kommunan hevur ætlað skulu vera á økinum. Tað, sum í ringasta føri kann henda, er, at kommunan fyribils missir ætlaða handils- og mentanarumhvørvið, sum kommunan annars hevur ætlað sum partur av eini miðbýrarmynd, sigur Óli Marner.

Hann vísir á, at tað er kapping, sum skapar framdriftina, og samanum tikið fegnast hann bara um, at okkurt fer at henda við handilslívinum í Klaksvík nú.

– So leingi, sum spaki ikki er settur í, og einki er byrjað, er longri á mál, sigur Óli Marner Christiansen.